


## Fann fløskupost við Auschwitz

Polskir arbeiðsmenn hava funnið ein hondskrivaðan lepa í einari fløsku nærhendis týsku týningarleguni Auschwitz í Póllandi. Á lepanum eru nøvn, fanganummar og heimbýarnøvnini hjá sjey fangum úr Fraklandi og Póllandi, og minst tveir teirra sluppu livandi úr fangaleguni. Lepin er dagfestur tann 9. september í 1944 ella knappar tríggjar mánaðir áðrenn tann sovjetski herurin kom til leguna og fríaði teir umleið 7.000 fangarnar, sum vóru eftir á lívi tá. BBC sigur, at ein av persónunum á lepanum er framvegis á lívi og býr í Fraklandi.



*Sáttmálin hjá Tjóðpalli Føroya var í dag undirskrivaðaur av stjóranum fyri Tjóðpallin, Jenny Petersen, Anniku Sølvará, forkvinnu í Leiklistaráðnum og formanninum fyri Leikarafelagnum, Páll Danielsen*

# Sjónleikarar endiliga fingið sáttmála

**Tjóðpallur Føroya fegnast um sáttmálan, sum fer at tryggja yrkisleikarum í Føroyum sømiligar arbeiðsumstøður**

LEIKLIST

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Í dag er stórur dagur er fyri sjónleikarar knýttir at Tjóðpalli Føroya. Sáttmáli er undirskrivaður av Tjóðpalli Føroya og Leikarafelag, sum staðfestir lønar- og setanarviðurskifti í samband við leikarar hjá Tjóðpallinum. Partarnir hava í langa tíð samráðst um umstøðurnar hjá føroyskum yrkisleikarum, og eftir drúgvar tingingar er avtala loksins fingin í lag. Í tíðindaskrivi siga partarnir, at sáttmálin er eitt umráðandi stig rættan veg. Umframt at fáa umstøðurnar hjá leikarunum uppá pláss, ger sáttmálin arbeiðið hjá leiðslu og starvsfólki lættari.

### Í tíðindaskrivinum stendur:

"Leikarafelag Føroya er fakfelag hjá yrkissjónleikarum og øðrum, sum arbeiða burturav við yrkisleiklist í Føroyum. Í nógv ár var felagið eitt áhugafelag hjá teimum, sum starvaðust burturav við leiklist. Tá Tjóðpallur Føroya fór at virka av álvara í 2005, varð Leikarafelag Føroya broytt til eitt fakfelag, hvørs endamál í høvuðsheitum er at tryggja limum sínum bestu arbeiðsumstøður.

Felagið vendi sær til Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum fyri at fáa í lag ein sáttmála, men Lønardeildin metti, at bólkurin var alt ov lítil, til at tað bar til at gera ein sjálvstøðugan sáttmála. Mælt varð í staðin til, at bólkurin fór upp í eitt av størri fakfeløgunum. Hetta ynskti felagið ikki, tí at arbeiðsviðurskiftini eru so sermerkt, at eingin annar sáttmáli varð mettur hóskandi til endamálið. Hesi meting hevur leiðslan fyri Tjóðpallin verið samd í.

Í fleiri ár hevur verið togast aftur og fram um málið, til tíðliga í ár, tá Lønardeildin mælti til at gera beinleiðis avtalu millum Leikarafelagið og Tjóðpallin. Eftir at hava tryggjað okkum, at ein slík avtala hevur somu tyngd og virði sum ein vanligur sáttmáli, hava Leikarafelagið og Tjóðpallurin samráðst um málið. Úrslitið er avtalan, sum í dag er undirskrivað í samráð og fullari semju við Lønardeildina og Mentamálaráðið."

Næsta stig hjá Tjóðpallinum er at fáa til høldar hóskandi høli og fíggjarligu viðurskiftini uppá pláss.

## Havnarkórið konsert og sanghugnaløtu

**Sunnudagin 3. mai klokkan 16 – krossmessudag, bjóðar Havnarkórið til konsert og sanghugnaløtu í Müllers Pakkhúsi í Havn**

KONSERT

Inngnangandi framførir kórið tá tríggjar satsir eftir John Høybye til sangirnar »Mítt vakra heim« (lag: H. J. Højgaard, orp: Rasmus Effersøe), »Beinta« (lag: Christian Wahl, orð: Oskar Hermansson) og »Um eg kundi kvøðið« (lag: Stanley Samuelsen, orð: J. H. O. Djurhuus)

Tí næst koma fýra norðurlendskir kórsangir: »Kaydate« (Knut Nysted, Norra), »Tit er jeg glad« (Carl Nielsen, Danmark – satsur: John Høybye), »Tjuv och tjuv, det skal du heta« (Svenskt fólkalag – satstur: Hugo Alfvén) og »Sefur sól hjá ægi« (Sigfús Einarsson, Ísland).

Fyrri framførsluparturin endar við tí gitna opus 104 hjá Johannes Brahms, fimm hugtakandi kórsatsir (»Nactwache I«, »Nachtwache II«, »Letzts Glück«, »Verlorene Jugend« og »Im Herbst«) við tí eyðkenda romantiska tónalagnum hjá Brahms.

Í steðginum bjóðar Havnarkórið ein kaffimunn við nýbakaðum vaflum afturvið. Eisini fáa áhoyrararnir tá høvi til saman við kórinum at »syngja summarið inn« við kendum vár- og summarsangum úr hefti, sum verður býtt út.

Eftir steðgin trínur kvinnukórið upp á pall við fýra vár- og summarkendum sangum á týskum og enskum máli, og blandaða korið endar hesa seinnapartsløtuna í Müllers Pakkhúsi við einum enskum og einum italskum madrigali, einum írskum fólkalag og eggjandi amerikanskum negro spiritual: »Ain'-a That Good News!«

Konsertin er ókeypis og bryjar klokkan 16.